SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of *KPMG* International a Swiss Cooperative

## SPEKT søkir grannskoðarar
### til skrivstovurnar í Tórshavn og í Runavík

Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar.

**Umsøkjarin**
Søkt verður bæði eftir grannskoðarum við royndum og uttan royndir.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi er fryntligur, fyrikomandi og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

Eisini er tað ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjarin uttan royndir innan grannskoðan, hevur royndir innan bókhald og hevur lokið HH-prógv ella líknandi útbúgving.

**Útbúgvingin**
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum dagliga arbeiðið skulu okkara starvsfólk nema sær ástøðiliga útbúgving við at fylgja HD-undirvísingini á Føroya Handilsskúla.

Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

**Framtíðarmøguleikar**
Aftaná lokið HD-prógv er møguleiki fyri at halda áfram at nema sær ástøðiligu útbúgvingina cand.merc.aud., sum er neyðug fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir verður at senda til okkum skjótast til ber ella í seinasta lagi 1. juni 2006.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 34 ella 22 28 52.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f grannskoða, veita roknskapartænastu og ráðgeva í skatta- og vinnuviðurskiftum. Hjá SPEKT starvast 24 fólk. Fýra teirra eru ríkisgóðkendir grannskoðarar. Vit arbeiða millum annað fyri einstaklingar, handilsfyritøkur, ídnaðarfyritøkur, kolvetnisfeløg, reiðaravirki, peningastovnar, fíggingarstovnar, kommunur og almennar stovnar.
SPEKT statsaut. revisorar Sp/f eru tilknýttir altjóða KPMG kervinum av grannskoðara- og ráðgevingarvirkjum.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15 · Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM 85




# Nilfisk á Skarv

**Nei, Skarv hevur ikki fingið nýggjan dustsúgvara, sum yvirskriftin kundi bent á. Talan er um konsert við vælumtókta íslendska rokkbólkinum Nilfisk, ið hóast teir eru kendir í heimlandinum, ongantíð áður hava spælt uttan fyri Ísland**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hesir fýra ungu tónleikarir spæla trummur, bass, tveir el-gittarir og syngja. Teirra fløga hevur selt væl í Íslandi, og hava teir m.a. hitað upp fyri heimskenda rokkbólkin Foo Fighters, tá hesin spældi í Íslandi.

Hetta er fyrstu ferð í tey 30 árini Skarv hevur verið til, at ein íslendskur bólkur spælir har. Av Skarv verður sagt, at ætlanin er í framtíðini, umframt allan føroyska tónleikin eisini, at hava íslendskar bólkar at spæla av og á fríggjakvøld. Í løtuni er talið av vitjandi fríggjakvøld ikki nøktandi, meðan barrin leygarkvøld altíð er á tremur við føroyingum.

Nógvir íslendingar búgva í Keypmannahavn, men hava einki fast stað til livandi tónleik í danska høvuðsstaðnum. Føroyingar og íslendingar hittust nógv á Skarv tey fyrstu árini, tá Skarv lat upp fyri 30 árum síðan.

Føroyingar og íslendingar hava søguliga havt stórt mentanarligt tilknýti til hvør annan, og seinastu tíðina eru sambondini styrkt uppaftur meira, við eitt nú AME Reykjavík, og føroyskum tónleikanøvnum, ið gera vart við seg í Íslandi. "Hetta er ein sera spennandi avbjóðing fyri okkum", sigur eigarin av Skarv, Dánjal Petur Thorsteinsson, ið sjálvur er ¼ íslendingur og dugir íslendsk.

## Leiðari til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík

SUNDA KOMMUNA

Sunda kommuna søkir eftir leiðara til dagstovnin, at byrja tann 1. juni 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og tann setti skal hava námsfrøðiliga útbúgving.

Dagstovnurin er skipaður sum ein felags eind, við børnum frá 0 til 10 ár.

**Vit ynskja:**
- At tú hevur hug og hegni at leiða, dugir at samstarva og ert fyrikomandi.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og foreldrunum.
- At tú hevur hug at skapa og seta dám á okkara dagstovn.
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á sosialu deild, tlf. 471022 ella 771023.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2006, og skulu sendast til:

**Sunda kommunu**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki.

Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík er ein av trimum dagstovnum í Sunda Kommunu. Dagstovnurin er normeraður til 58 børn, hevur eitt ár á baki, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Dagstovnaleiðarnir á økinum, tvs. í Hósvík, á Oyrarbakka og í Hvalvík, hava eitt gott og tætt samstarv á økinum í samráð við kommununa.

## LÆRLINGAR

Søkt verður eftir lærlingum í yrkinum maskinsmiður.

Hava tit hug til hetta arbeiðið á einum áhugaverdum arbeiðsplássi í støðugari menning, so send eina skrivliga umsókn við viðkomandi prógvum til okkum.

Nomatek arbeiðir innan projektering og framleiðslu av útgerð til fiskivinnuna og útgerð til reinsing av vatni:

- maskinur og útgerð til flakavirkir
- maskinur og útgerð til alivinnuna
- hagreiðingarlinjur til fiskiskip
- ráðgeving í sambandi við innrætting av virkjum og skipum

Arbeiðið fevnir mest um framleiðslu úr rustfríum stáli við framkomnum maskinum og væl útbúnum maskinsmiðum og sertifikatsveisarum.



NOMATEK
Við Sandá 1 · Postsmoga 1116
FO-110 Tórshavn · Tel. 356900 · Fax 356901